# Góð úrslit í altjóða kappingum

**B ridgelandsliðið hevur júst tikið lut í stórari kapping í Bonn, og hóast liðið endaði nummar 17 av 18, so lata tey væl at føroyska avrikinum**

BRIDGE

*Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen*

Føroyska bridgelandsliðið er av álvara á veg inn á altjóða bridgepallin. Við Svend Novrup settum sum venjara varð fyri bara einum lítlum ári síðani avgjørt á fyrsta sinni at senda lið til EM í bridge. Ein stór avgerð, ið bæði ítróttarliga og fíggjarliga kundi tykjast heldur stórur biti. Men nú EM kappingin nærkast — hon verður 15. til 29. juni í Salsomaggiore í Italia — sær eitt sindur ljósari út. Fíggjarliga gongur tað rætta vegin, eftir at bæði nevndin í FBS og leikararnir sjálvir hava lagt eitt avbera stórt arbeiði í at fáa stuðul til vega frá góðum fólki og fyritøkum.

Ítróttarliga gongur eisini framá. Vit fingu ikki stundir at gloyma sigurin á danska EM landsliðnum í Graasten í apríl, fyrr enn aftur frættist frá góðum úrslitum úr fyrrverandi týska høvuðsstaðnum Bonn. Føroyingar høvdu lið við í kappingini, ið eisini verður nevnd mini EM - ein afturvendandi kapping, har lond hittast at fyrireika seg til EM.



*Føroyska liðið hevði eisini onkrar fríløtur, soleiðis at teir kundu líta seg eitt sindur um í Bonn*

## Kappingin í Bonn

Kappingin var spæld í lítla Bonn forstaðnum, Bad Godesburg, 8. og 9. mai. Manningin á føroyska liðnum var Jóannes Mouritsen, Heðin Mouritsen, Arnbjørn Sivertsen og Hans Jacob Petersen, liðsskipari var Svend Novrup. Liðið leikti 11 dystir á 10 spøl hesar báðar dagarnar. Vit vunnu tríggjar dystir:

| | |
|---|---|
| Føroyar — Kekkia | 25-05 |
| Føroyar — Svøríki | 21-09 |
| Føroyar — Wales | 16-14 |

Úrslit, ið tala fyri seg, hóast dystirnir bara vóru á 10 spøl. Harafturat fingu vit heiðurlig smátap í fýra dystum:

| | |
|---|---|
| Føroyar — Rumenia | 12-18 |
| Føroyar — Ungarn | 13-17 |
| Føroyar — Týskland 2 | 13-17 |
| Føroyar — Luksemburg | 14-16 |

Fýra dystir taptu vit stórt, men um tað kann vera nakar uggi, so vóru í øllum dystunum góðir møguleikar at vinna. Manglandi rutina og dystarvenjing ímóti sterkari mótstøðu gjørdu her munin:

| | |
|---|---|
| Føroyar — Estland | 06-24 |
| Føroyar — Eysturríki | 08-22 |
| Føroyar — Luksemburg | 04-25 |
| Føroyar — Frakland | 03-25 |

Sum heild var hetta ein góð kapping fyri Føroyar, ið gevur orsøk til eitt ávíst bjartskygni undan EM kappingini. Men lat okkum endiliga ikki taka nakra gleði í forhond, tí EM er ein hørð kapping í nógvum hita yvir tvær samfullar vikur, og eingin kann vita frammanundan, hvussu føroysku leikararnir klára tílíkt.

## Endaliga úrslitið í Bonn:

Finala:

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Eysturríki | 59 imp |
| 2 | Ísrael | 28 imp |
| 3 | Belgia | 193 kp |
| 4 | Wales | 190 |
| 5 | Danmark | 179 |
| 6 | Svøríki | 175 |
| 7 | Italia | 169 |
| 8 | Bulgaria | 169 |
| 9 | Týskland 2 | 165 |
| 10 | Estland | 165 |
| 11 | England | 161 |
| 12 | Rumenia | 159 |
| 13 | Týskland 1 | 155 |
| 14 | Frakland | 151 |
| 15 | Ungarn | 145 |
| 16 | Kekkia | 144 |
| 17 | Føroyar | 135 |
| 18 | Luksemburg | 121 |

## Gott mótspæl ímóti Týsklandi

v/-

| | | |
|---|---|---|
| | J42 | |
| | 10 | |
| | AQ76432 | |
| | 86 | |
| AQ95 | | 103 |
| AJ8 | | 9653 |
| J | | K1098 |
| AQ952 | | J73 |
| | K876 | |
| | KQ742 | |
| | 5 | |
| | K104 | |

| V | N | E | S |
|---|---|---|---|
| Arnbjørn | Humburg | Hans Jacob | Mattsson |
| 1kl | 3ru | pass | pass |
| D | pass | pass | pass |

Meldini gingu á sama hátt í hinum rúminum. Norðan sperrar, Vestan vísir eina sterka hond við einari dupling, og Eystan letur standa sum straff.

Hans Jacob spældi sp 10 út til frúgv hjá Arnbjørn, sum tók sp A og spældi sp 5 til trumf hjá makkaranum. Kleyvari kom aftur til frúnna, og Arnbjørn tók kl A og hjA, áðrenn hann spældi enn ein spaðara til trumf hjá Hans Jacob, sum seinni eisini skuldi hava fyri ru K. 3ruD —4 gav 800 til Føroyar. Við hitt borðið gekk mótspælið ikki eins væl, so Heðin og Jóannes sluppu við at fara tríggjar niður og góvu bara 500 út.

## Bridgedeild Kaggans - Kagga Cup

Tann árliga Kagga Cup í bridge varð leikt í Kagganum leygardagin 11. mai. Við í kappingini vóru 16 innboðin pør. Tey flestu pørini hava leikt við í kappingini hjá Bridgedeild Kaggans í vetur. Sigast má, at tiltakið var framúr væleydnað, og allir luttakararnir vóru sera væl nøgdir.

Bogi Simonsen og Eyðun Joensen vunnu kappingina við 320 stigum.

Samlaða úrslitið (miðal 224):

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Bogi Simonsen — Eyðun Joensen | 320 |
| 2 | Carl Mikkelsen — Egil Helmsdal | 270 |
| 3 | Niels Nielsen — Øssur Winthereig | 253 |
| 4 | Pól Joensen — Eyðun Jensen | 242 |
| 5 | Rói á Rógvu Joensen — Oddmar Danielsen | 225 |
| 6 | Jórun Johannesen — Súsanna Dam | 225 |
| 7 | Hallberg Arnfríðsson — Børge Egholm | 225 |
| 8 | Finn Ougaard — Høgni Jacobsen | 223 |
| 9 | Laila Danielsen — Danny Danielsen | 213 |
| 10 | Hans Egil Joensen —Edmund Joensen | 213 |
| 11 | Marjun Restorff — Arnleyg Mikkelsen | 212 |
| 12 | Eyðun Anthoniussen — Robert Langgaard | 207 |
| 13 | Marner Joensen — Jógvan Ranghamar | 202 |
| 14 | Jógvan Juel Rasmussen — Jóna Grunnveit | 187 |
| 15 | Petur A. Johannesen — Eilif Petersen | 185 |
| 16 | Salomon Johansen — Zacharis Joensen | 182 |

## Tiltak í SMS

Hesa vikuna týsdagin 21. til leygardagin 25. mai hava bridgelandsliðini tiltøk í SMS, har m.a. ein scootari verður burturlutaður. Harafturat verður ein framsýning við gomlum og nýggjum bridgemyndum. Bridgeborð verða sett upp á torginum, so møguleiki verður at fáa sær nøkur spøl har. Tónleikur verður eisini at hoyra á pallinum av og á.

# Greipuvinnarar



Dreingir 12 ár hjá Kyndli gjørdu rættiliga bart, tá hondbóltskappingin var í vetur. Bæði í lands- og steypakapping gjørdust teir fremstir, og ognaðu teir sær sostatt greipuna.

Í landskappingini var Tjaldur á øðrum plássi frammanfyri ávíkavist StÍF og Neistin, og í steypakappingini var raðfylgjan nærum hin sama. Tá eydnaðist tó Neistanum at gerast nummar trý framman fyri StÍF.




**Handilslærlingur**

**Hevur tú hug at royna teg?**

Vit søkja eftir fólki til handil okkara, arbeiðsuppgávurnar koma at umfata samskifti við viðskiftafólk, útkoyring, bílegging av vørum og egin ábyrgd av starvsøki, umframt aðrar uppgávur.

Væntað verður at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt, ert fyrikomandi, við til uppsøkjandi uppgávur, nógva orku og áræði, ert opin og ikki bangin fyri avbjóðingum. Dentur verður lagdur á at tú hevur hug til at veita viðskiftafólki eina góða tænastu og ert ábyrgdarfullur.

Fyrimunur um tú hevur teldukunnleika og áhuga/kunnleika til motorar og maskinur - *ert kreativur.*

Skrivlig umsókn ynskist til 1. juni 2002

*Handilsfyritøkan Kaj Andreasen & Co. varð stovnað í Tórshavn í 1970. Fyritøkan útvegar maskinur og útgerð til byggivinnuna, og útgerð til fiski- alivinnuna, skip og bátar*

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla · Smásøla · Umboð
Postboks 1200 · 110 Tórshavn

**Umsjónarfólk**

Við hesum verður søkt eftir umsjónarfólki til svimjihylin við Sandoyar Meginskúla.

Uppgávan er at halda opið til almenna svimjing, ella tá leigað verður. Viðkomandi skal umsita innkrevjing, avroknað við skúlan og síðan gera reint aftaná.

Viðkomandi skal hava neyðugan førleika í fyrstuhjálp ella líknandi. Um neyðugt skal farast á skeið fyri at fáa neyðugan kunnleika.

Arbeiðstreytir og løn fæst nærri at vita um við at venda sær til formannin.

Umsóknir skulu vera formanninum í hendi í seinasta lagi 01. juni 2002.

**Sandoyar Skúlasamband**
Eyðun Viderø, form.
210 Sandur

**Umsjónarmaður**

Sunda kommuna søkir eftir umsjónarmanni til at taka sær av bygningum og øðrum útbúnaði í kommununi.

Ynskiligt er at viðkomandi er handverkari.

Í kommununi er ein umsjónarmaður og tann nýggi umsjónarmaðurin kemur at samstarva við hann.

Løn verður ásett eftir nærri avtalu.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til: tlf. 212444.

Umsóknin skal vera kommununi í hendi áðrenn 15. juni 2002.

**SUNDA KOMMUNA**
460 Norðskála
Tlf. 422113
Fax 422575
t-postur: sundakom@post.olivant.fo

**HYGG HER**

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

**Brúktir bilar til sølu**

**Citroen Jumper CH. v/last**
km. 120.000, árg. aug. 1998
**130.000,-**

**Citroen Xsara 1,6i 5h**
km. 30.000, árg. feb. 1998
**107.000,-**

**Citroen Xsara 1,6i stc**
km. 23.000, árg. aug. 2000
**129.000,-**

**Citroen Xsara 2,0 HDi Stc. 5H**
km. 83.000, árg. juni 1999
**140.000,-**

**Citroen ZX 1,9D 5H STC**
km. 89.000, árg. mars 1996
**86.000,-**

**Mitsubishi L300 2,5D**
km. 161.000, árg. juni 1994
**70.000,-**

**Mitsubishi Lancer 1,5 GLXi 5h**
km. 145.000, árg. mai 1992
sýnaður 08'00 **52.000,-**

**Ford Sierra 2,0i CLX 4h**
km. 110.000, árg. nov. 1991
**45.000,-**

**Hyundai Accent 1,3 LS 5H**
km. 65.000, árg. feb. 1999
**75.000,-**

**Seat Cordoba 1,9SDi STC. 5h**
km. 35.500, árg. aug. 1999
**115.000,-**

**Ford Courier vøruv. 1,8D**
km. 78.000, árg. feb. 1996
**47.000,-**

**Mazda 323 1,3 4h**
km. 211.000, árg.mars 1989
**32.000,-**

**Mazda 323 1,5 4h**
km. 130.000, árg. apr. 1997
**75.000,-**

**Peugeot 306 1,9D 4H**
km. 161.000, árg. mai 1995
**84.000,-**

**Peugeot 406 2,0i 4H**
km. 94.000, árg. aug. 1996
**125.000,-**

**Møguleiki er eisini at royna nýggjar bilar**

*Vælkomin til*
CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurin - 311820

P/F ALMA *Maskinverkstaður & Smiðja*

**Munters avfuktarar**
**Fyribyrgja og loysa fukttrupuleikar**



P/F ALMA
á Hjalla 15
P.O. Box 1338
FO-110 Tórshavn
Tel. 315 890
Fax 313 500
E-mail: alma@alma.fo
www.alma.fo

**MUNTERS umboðið í Føroyum**

CAT MaK GROVE worldwide Atlas Copco Munters BUCHER

Hoyggjturkari



- Turkar 20' kontainara við vátum grasi uppá uml. 6-8 tímar
- Bíligur í rakstri uml. kr. 20,- um tíman írokna streym og dieselolju
- Tú kanst turka gras í oysandi regni fyri umleið kr. 20,- um tíman
- Kvalitetur og long livitíð
- Royndir í Føroyum við sera góðum úrsliti

Seinasta freist at bíleggja fyri at náa levering til slátturin í ár er innan 01.05.02

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla & umbo - Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin
Bilar
Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar
Ítróttur
Nøvn
Skráir
Tiltøk